<nýtt - nýtt>

3arin <nýtt - nýtt>

matchbox twenty

heiti: more than you think you are
skeringar: 12 + 1 videolag
plátufelag: melisma

dj bobo



heiti: visions
skeringar: 15
plátufelag: bmg berling musik

kelly rowland

heiti: simply deep
skeringar: 14
plátufelag: sony music

kashmir

heiti: zitilites
skeringar: 14
plátufelag: sony music

stuart little 2

høvuðsleiklutir: geena davis, hugh laurie og jonathan lipnicki
longd: 74 minuttir
prod. ár: 2002

tvey ár eru liðin síðani Stuart flutti inn hjá familjuni Little. Men sjálvt um Stuart stórtrívist, leingist honum eftir einum vini, sum er hansara egni. So tá ein særdur fuglur, sum eitur Margalo, bráðliga lendir á bilinum hjá Stuart og fortelur, at hon er vorðin hótt av tí ónda Falcon, bjóðar Stuart henni at búgva hjá familjuni Little. Men tá Margalo hvørvur á ein løgnan hátt, fara Stuart og kettan Snowbell á eina vandamikla og spennandi ferð fyri at finna hana og loysa gátuna...

road to perdition



høvuðsleiklutir: tom hanks, paul newman og jude law
longd: 112 minuttir
prod. ár: 2002

Árið er 1931. Meðan depressiónin kastar langar skuggar yvir nógvar amerikanskar familjur, ræður at síggja til friður og lýðin ordan hjá familjuni Sullivan. Michael Sullivan (Tom Hanks) hevur at síggja til eina púra vanliga tilveru við konu síni og tveimum væl uppaldum synum – men tað vakra heiðursmerkið hevur eisini eina myrka og blóðuga baksíðu. Í veruleikanum er Sullivan hitman fyri tann patriatiska gangastaran John Roony (Paul Newman), hvørs synir eisini eru við í arbeiðnum. Eitt púra vanligt kvøld á einum púra vanligum arbeiði gongur alt brádliga galið, og knappliga verða Sullivan og elsti sonur hansara kastaðir út á eina ferð ígjøgnum lond við einum ísakøldum samstarvsfelaga í hølunum

the bourne identity



høvuðsleiklutur: matt damon
longd: 114 minuttir
prod. ár: 2002

Hesin action-thrillarin er bygdur á altjóða bestseljaran hjá Robert Ludlum.

Jason Bourne (Matt Damon), sum er vorðin bjargaður við tveimum kúlum í rygginum hevur mist minni. Hann uppdagar skjótt, at hann verður noyddur at finna útav, hvør hann er fyri at yvirliva. Hann verður jagstraður av drápsmonnum í eini kapprenning ímóti íðini, samstundis, sum Bourne skjótt finnur útav, at hann hevur eitt dreparainstinkt...

scooby-doo

høvuðsleiklutir: freddie prinze jr., sarah michelle gellar, matthew lillard, linda carollini og rowan atkinson
longd: 83 minuttir
prod. ár: 2002

Jaiks! Tvey ár eftir, at ein innanhýsis ósemja noyddi Mystery Inc. til at lata hurðarnar aftur, verða Scooby-Doo og hansara løgnu detektiv-vinir Fred (Freddie Prinze Jr), Daphne (Sarah Michelle Gellar), Shaggy (Matthew Lillard) og Vela (Linda Cardellini hvør fyri seg kallað til Spooky Island fyri at kanna eina røð av yvirnáttúrligum hendingum í tí spildurnýggju undirhaldsparkini Spring Break.

Eigarin av Spooky Island, Emile Mondavarious, er bangin fyri at tað spøkir í undirhaldsparkini og roynir at fáa tey ungu saman aftur, so tey kunnu loysa gátuna, áðrenn tann yvirnáttúrligi loynidómurin ræður allar gestirnar vekk. Scooby og vinirnir noyðast, háost teir eru ósamdir, finna útav tí saman og gloyma alt, sum tey higartil vistu um følsk spøkilsi og løgnar verur fyri at loysa málið, bjarga sær sjálvum og kanska eisini restini av heiminum...

Gwyneth Paltrow trúlovað

Gwyneth Paltrow hevur funnið mannin, sum hon ætlar at gifta seg við. Tað er sangarin í Coldplay, Chris Martin. Hóast Gwyneth hevur gingið saman við fleiri øðrum áður, so hevur hon helst ongantíð verið so vís í, at hon hevur funnið tann rætta sum hesuferð. Vinir hjá henni siga, at Chris tosar um hana sum sína trúlovaðu allatíðina. Hann tykist púra vekk í henni og tosar so at siga ikki um annað enn, at tey skulu gerast kona og maður. Gwyneth sjálv er eisini púra vís í, at hon hevur funnið tann rætta. Hon tosar um hann allatíðina, og hon sigur, at tann einasti feilurin, sum Chris hevur gjørt er at tveita skitnar hosur allastaðni, men annars er hann perfektur, sigur also Gwyneth Paltrow, sum áður hevur gingið saman við hjartaknúsarum sum Brad Pitt og Ben Affleck. Gwyneth misti pápa sín, Bruce, í fjør, og tað er nústani nú, at hon hevur funnið lívsgleðina aftur, takkað veri Chris Martin.

Courthey Cox og David Arquette ynskja sær børn

Tað letur til at vera sera trupult hjá teimum báðum at fáa børn. Courtney hevur verið við barn tvær ferðir, men báðu ferð hevur hon mist fostrið.

Og alt meðan tað biologiska urið hjá Courtney tikkar harðari og harðari, økist ynski hjá henni um at gerast við barn samsvarandi. Hon er nú vorðin 38 ára gomul, og tíðin stendur sanniliga ikki í stað hjá henni.

Tvær ferðir hava tey roynt kunstiga giting, tá tað ikki eydnaðist teimum at gerast við barn upp á tann náttúrliga mátan, men báðu ferðirnar endaði tað við, at sjónvarpsstjørnan kastaði burtur.

Men vónandi fer tað at eydnast teimum triðju ferð. Tey vóna, at tey fara at fáa eitt barn í leypi av tíggjundi og seinastu sesong av Vinum.

– Beint nú tekur Courtney tað róligt og slappar av, meðan hon roynir av øllum alvi ikki at taka trupulleikarnar við at halda upp á eitt barn ávirka seg ov nógv, sigur ein kelda. – Hon vil verða rólig, tá gitingin fer fram í vár einaferð. Hon roynir at hugsa positivt og harvið at hjálpa læknunum við at gera, hvat teir kunnu fyri at barnsburðurin skal eydnast hesuferð.

Courtney Cox varð gitin kunstigani fyri aðru ferð í oktobur, og hon var í sjeynda himni, tá hon uppdagaði, at hon var við barn. Hon segði tað fyri teimum nærmastu, men tá sjey vikur vóru farnar, var greitt, at okkurt varð galið, og hon kastaði burtur sama kvøldið.

Ein kelda frá Vinum sigur, at Courtney so gott sum ikki tosar um annað enn at fáa børn. Starvsfelagarnir hava roynt at stuðla henni við millum annað at eggja henni til at taka eitt sindur uppá. Hon hevur verið óhugnaliga kløn, men nú letur til, at hon er farin at gera nakað við tað. Summi av hennara nærmastu vinum eru sannførd um, at tað at hon var so kløn var ein orsøkin til, at hon so torført hjá henni at gerast við eitt barn. Men tað tordi ongin at siga beint út við hana.

Keanu Reeves aftur lukkuligur

Matrix-stjørnan hevur enn einaferð funnið saman aftur við síni fyrrverandi unnustu, Amanda Decadenet. Tey bæði kunnu eyðsæð ikki vera hvønnannan fyri uttan. Tí tey hava gjørt tað liðugt fleiri ferðir, men kortini finna tey altíð saman aftur. 37 ára gamli Keanu var á flogvøllinum í Los Angeles eftir Amandu. Og tá tey sóust aftur gingu tey beint í armarnar á hvørjum øðrum og løgdu nóg illa tilmerkis, at øll hini ferðafólkini sjálvandi kendu Matrix-stjørnuna aftur.

Keanu Reeves hevur annars verið í gjøgnum nógv seinastu árini. Fyrst mistu hann og táverandi unnusta hansara, Jennifer Syme, eina dóttur, tá hon varð følld. Og síðani lat Jennifer lív í eini ferðsluvanlukku bara eitt ár aftaná. Tá fór Reeves av góðum grundum niður við flagginum. Men nú letur til, at hann hevur funnið lukkuna aftur í lívinum, og tað er uttan iva vøkru Amandu Decadenet at takka.

Mamma upp á fulla tíð

Sarah Jessica Parker frá Sex and the City stórtrívist í hennara nýggjasta leikluti sum mamma upp á fulla tíð. Herfyri vóru hon og gemalurin, Matthew Broderick, í Hollywood og leitaðu eftir einum húsi. Og sjálvandi slapp fýra mánaðar gamli James Wilke við. Sarah noktar so at siga at fara nakrastaðni, uttan at hann er við.

Parið hevur longi búð í New York, men nú hava tey ætlanir um at flyta til tað sólríka California, so skjótt tey hava funnið eini hóskandi hús.

Framvegis saman

Fleiri ferðir hava søgurnar gingið um, at Tom Cruise og Penelope Cruz ikki eru saman longur, men tað hava bara verið søgur. Tí hóast Tom Cruise er sera vælumtóktur, so tekur hann altíð børnini og unnustuna framum.

Vakra Penelope Cruz kom til Ný Sæland herfyri, har Tom er í ferð við upptøkurnar til filmin The Last Samurai. Tom hevði leigað eina flotta luksusvilla á strondini, har tað pláss fyri bæði unnustuni og børnunum báðum Connor, 8 og Isabella, 10, sum hann hevur saman við Nicole Kidman. Ein av døgunum tók Tom Cruise frí frá upptøkunum og fór á eina útferð við børnunum og Penelope. Tey fóru øll fýra umborð á privatflúgvarin hjá Tom og flugu ein túr yvir ein jøkul beint við tað størsligna fjallið Mount Cook.

Spice Girls koma ongantíð saman aftur

Nógvar søgur hava verið frammi um, at Spice Girls fara at koma saman aftur, men tað verður sligið fast einaferð med alla av Melanie C í einari samrøðu við Se og Hør. Hon sigur, at søgan er ispunnin og bara komin fram, tí at allar fimm genturnar vóru savnaðar til eitt sokallað gentukvøld í býnum herfyri.

– Vit ótu døgurða saman og hugnaðu okkum, meðan vit fjasaðu sum nakrar smágentur. Tað var serstakliga stuttligt at síggja Geri aftur, tí hana hava vit so at siga ikki sæð, síðani bólkurin fór hvør fyri sítt, men tað var so eisini alt, sigur Melanie C.

Hon sigur eisini, at genturnar vilja fegnar síggjast privat, men tær verða aldrin aftur at síggja á palli sum bólkurin Spice Girls.

Melanie C hugsar bert um sína solokarrieru nú, og hon hevur gingið saman við Thomas Starr í meira enn eitt ár nú. Hóast tað, so taka tey tað róligt, og ætlanir um hjúnarband eru ikki frammi í ljósinum – enn.

Gongur væl hjá Leonardo Dicaprio



Leonardo DiCaprio er í einum hepnum stima fyri tíðina. Tað gongur framúr við báðum filmunum, sum hann er aktuellur við í løtuni. Filmarnir eru: Gangs of New York og Catch Me If You Can. Eisini privat gongst honum væl. Hann er fyri tíðina saman við Sarah Foster, sum er ein av kandidatunum til at verða tann nýggjasta mega-stjørnan í Hollywood. At Sara so eisini hevur eina fortíð innan modelheimin ger tað ikki verri.

Rachel Hunter hevur gloymt Robbie Williams

Eftir at hava verið saman við Robbie Williams í eina tíð, gjørdi Rachel Hunter av at stinga av, tí Robbie var, sambært Rachel ov psykotiskur til at liva saman við. Og hon hevur gjørt skjótt av at gloyma hann. Í øllum førum er hon sædd saman við Wesley Scantlin, 27 ár, sum er kendur sum frontpersónur í amerikanska rokk orkestrinum Puddle of Mudd.

Við hesum undirstrikar Rachel enn einaferð, at mytan um modellir og rokkstjørnur ikki er av leið. Hon giftist í 1990 við Rod Stewart, men bleiv skild frá honum, og síðani hevur hon bert ligið framvið, tá talan er um yngri mannfólk, sum eru væl fyri – bæði so og so.

topp.10/dvd

01. Dragejægerne
02. Bourne Identity
03. Road to Perdition
04. Austin Powers – Goldmember
05. Sweetest Thing
06. Sum of All Fears
07. Signs
08. About a Boy
09. Scooby Doo
10. Stuart Little

topp.10/cd rom

01. C&C Generals
02. Sims – Unleashed
03. Sims – Deluxe Edition
04. Master of Orion
05. Medieval – Total War
06. Morrowind
07. Unreal 2
08. Iron Storm
09. Operation Flashpoint Resistance Exp.
10. Icewind Dale 2

topp.10/cd-rom

01. Dragejægerne
02. Bourne Identity
03. Road to Perdition
04. Sum of All Fears
05. Stuart Little 2
06. Spiderman
07. Sweetest Thing
08. Signs
09. Scorpion King
10. Skulls

topp.10/fløgur

01. Ymiskt – Now 3
02. Ymiskt – Emotions
03. Country Sisters – Live
04. Brandur Enni – Brandur
05. T.A.T.U – 200 km/h in the Wrong Lane
06. Ozzy Osbourne – The Essential
07. Razz – Kast dine Hænder op
08. Ymiskt – Nu Divas 2
09. Kelly Rowland – Simply Deep
10. Robbie Williams – Escapology

3arin